


# Fabia - ein bilur Skoda kann vera errin av

MAGNUS GUNNARSSON

Tíðin er farin frá øllum søgunum um Skodabilarnar, og tá børn vóru happað av øðrum børnum, tí tey áttu ein Skoda. Tann nýggi Skoda Fabia er ein bilur, sum Skoda bilaverksmiðjan kann vera errin av. Linjurnar eru ikki áleypandi á nakran hátt, men vinna í longdini, og bilurin er sera væl gjørdur. Sjálvt um fleiri av teimum ovastu stjórunum í Skoda, ið nú er ein partur av VW Group, eru týskarar, er bilurin gjørdur í Tjekkia.

### Elektriska servostýring

Fabia hevur ein nýggjan plattform, ið eisini skal brúkast til ein komandi VW Polo og Seat Ibiza.

Umhvørvið hjá bilinum virkar einfalt og gott, og útsýnið á sama hátt. Forsetrið kann stillast upp og niður, rættið kann stillast bæði í frástøðu og longd. Eisini stuðla forsetrini kroppinum væl, og kunnu flytast so langt aftur, at fólk við longum beinum hava gott pláss.

Bilurin hevur 4 airbag og 5 nakkapútur og 3 punkts trygdarbeltir til øll setrini. Servostyringin, ið er eldrivin, belastar motorin minni enn tær hydraulisku.

Koyrieginleikarnir eru góðir og tryggir, og bilurin klárar seg sera væl í svingum, og fjaðraskipanin er ein tann besta í hesum klassanum. Hann er væl ljóðaður, og kvaliteturin er á høgum støði.

### Classic, Comfort og Elegance

Fabia fæst í trimum útgávum, Classic, Comfort og Elance.

Í fyrstu atløgu eru tríggir 1.4 l bensinmotorar at velja ímillum við ávikavist 60, 68 og 101 HK. Seinni kemur ein 1.6 l og ein 2.0 l bensinmotorur og tveir dieselmotorar, 1.9 SDI og 1.9 TDI.

Av standardútgerð kunnu vit nevna el-servostýring, ABS bremsur, pollenfiltur, airbag framman og í síðunum. Fabia hevur heilgalvanserað karrossarí við 10 ára garanti, 2 ára verksmiðjugaranti og 3 ára lakkanti.

Enn fæst bilurin bert við 5 hurðum, seinni kemur hann sum sedan við 4 hurðum og sum stationvognur. Hjá Nordbil vænta tey sær nógv av hesum frálíka bili, men vegna stóran eftirspurning, verður tað trupult at útvega nóg nógvar bilar at byrja við, so tey, sum ætla sær ein Skoda Fabia, mugu brynja seg við toli í fyrstu atløgu.

## Skoda Fabia 1.4 MPI

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 1.4 l bensin við 68 HK |
| 0-100 km/t | 15,5 sek. |
| Trekk | Framman |
| Bremsur | Skivur framman og trumlur aftan |
| Bensinnýtsla | 14,7 km/l |
| Dekkstødd | 185/60-14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 396 cm |
| Breidd | 165 cm |
| Hædd | 145 cm |
| Eginvekt | 1025 kg |
| Prísur | 107.750 kr |
| Søluumboð | Nordbil Oyggjarvegur FO-100 Tórshav |









SAAB



**Saab 9-3**
TiD 2,2 Diesel
(115 HK), 5 hurðar
kr. **240.000,00**

Saab 9-3 TiD er ein dieselbilur hvørs ferðaøking ber yvir flestu bensinbilarnar - frá 60 til 100 km/t uppá 8,3 sek. í 4 geari.

Loynidómurin er eitt høgt snarimoment við lágum umferðartali sameint við eginleikan, at motorurin alt fyri eitt reagerarar við trýst á spitaran.

Motorurin er útviklaður fyri at geva tygum størsta koyriupplivilsi - uttan mun til, um tygum koyra í býartrafikkinum ella um tygum royna møguleikarnar við Saab 9-3 á bygdarvegnum.

Fæst eisini sum bensinbilur Saab 9-3 2,0 i (130 HK), 5 hurðar kr. 204.800,00

**Standardútgerð t.d.:**
- ABS-bremsur
- Sentrallás
- El-drivnir síðurútar
- El hitaðir og drivnir síðuspegl
- Dupultir stoytkoddar
- Síðustoytkoddar framman
- Ein rúgva av Saab trygdarútgerð

**Sp/f John P. Vilhelm**
Yviri við Strond 4, Tórshavn
Tlf 313670 Fax 310699

Sosialurin - 311820



SAAB



**Saab 9-5**
Sedan 2,0 tSE
(150 HK)
kr. **330.900,00**

Saab Sedan 9-5 er ein sameining av tamarhaldi, góðum avriki, trygd, vøkrum sniði og nógvum hentleikum.

Hjá Saab verður stórur dentur lagdur á, at avrik, koyriupplivilsi og tryggleikí eru ein eind. Bilurin er smidligur og kraftfullur at koyra og er ein av tryggastu bilunum, ið finnast - eitt úrslit av trygdarfilosofiini hjá Saab - Real Life Safety. Sniðið á Saab er fyrr sum nú - reint, einfalt og uttan ov nógv prýði.

Saab 9-5 2,0t Sedan, fæst úr kr. 289.800,00

**Standardútgerð t.d.:**
- ABS-bremsur
- Sentrallás við fjarstýring
- El-drivnir síðurútar
- El hitaðir og drivnir síðuspegl
- Dupultir stoytkoddar
- Síðustoytkoddar framman
- ACC luftskiftisskipan
- Ein rúgva av Saab trygdarútgerð

**Sp/f John P. Vilhelm**
Yviri við Strond 4, Tórshavn
Tlf 313670 Fax 310699

Sosialurin - 311820